# Alvalon søkir eftir námsfrøðingum

Søkt verður eftir námsfrøðingum at arbeiða í vøggustovu og barnagarðsstovu uml. 30 tímar um vikuna, at byrja 1. august 2008.

Í Alvalon eru tað 6 stovur, 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og ein stova við 6 ára gomlum. Í Alvalon eru uml. 100 børn frá 0-7 ár.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setunarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og viðmælum skulu vera:

*Alvalon*
*Kjóadalsvegur 2*
*380 Sørvágur*
*Tlf. 363240*

Í hendi í seinasta lagi 12.juni 2008. Viðmerk. »umsókn«.

Um tit vilja hava meira at vita, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við Gittu av Kák leiðara á fartlf 233240, ella Tórdis Dam Johannesen varaleiðara á fartlf. 253540 Eisini standa størvini á heimasíðuni hjá Alvalon. www.123hjemmeside.dk/alvalon og á Vágaportalinum.fo .

Um námsfrøðingar ikki søkja, verða hjálp-arfólk sett ístaðin í tíðaravmarka starv.

Sørvágs Kommuna
www.sorvag.fo
VARÐAGØTA 8 · FO-380 SØRVÁGUR
SORVAG@SORVAG.FO · TEL 332004




> Telefonráðgeving > Anonymitet
> Tagnarskyldu > Stundir at lurta

Bláí Krossur
www.blakross.fo

SUNDA KOMMUNA

## Umsjónarfólk

Søkt verður eftir umsjónarfólki til skúlar og dagstovnar í Sunda kommunu at byrja sum skjótast.

Talan er um fulltíðarstarv og ynskiligt er, at viðkomandi hevur handverkaraútbúgving. Hetta er tó ikki ein treyt.

**Vit ynskja, at tú:**
- dugir at samstarva og ert fyrikomandi
- er fitt/ur í hondunum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- kann taka tær av ymsum øðrum fyrifallandi arbeiðsuppgávum

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á teknisku deild, Jógvan Waagstein, tlf. 471027 ella 771027.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **týsdagin 17. juni 2008**, og skulu sendast til:

**Sunda kommunu**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki

*Sunda kommuna fevnir um bygdirnar Hósvík, Hvalvík, Streymnes, Saksun, Langasand, Haldórsvík, Tjørnuvík, Oyri, Oyrarbakka, Norðskála og Gjógv. Umsjónarfólkini, sum frammanundan eru fimm í tali, taka sær av øllum neyðugum viðlíkahaldi í hesum bygdum, her í millum av skúlum, dagstovnum og øðrum ognum hjá kommununi.*

## Davidsen ættin í Kvívík

**Leygardagin 14. juni** verður skipað fyri samkomu fyri eftirkomarunum hjá Aggusteinus og Biritu Davidsen í Kvívík í sambandi við, at Bertie Davidson úr Kanada, sum er abbasonur Johan Hendrik Davidsen, kemur á vitjan.

Johan Hendrik flutti til Kanada í 1903 og hevur nógvar eftirkomarar har. Johan Hendrik var giftur við Wilhelminu Petersen av Válinum, dóttir Peter Frederik Johannesen og Angeliku f. Reinert.

Hugnaløta við ábiti verður í Glæmuni í Kvívík **14. juni kl. 12**, har skyldfólk og onnur áhugað eru vælkomin.

Tey, ið hava hug at koma, kunnu tekna seg á teldupostadressuni: davidsenfamiljan@gmail.com ella á telefon 257342 ella 255016 **innan 4. juni.**
**Kostnaður 100 kr**

Áhugað kunnu hyggja á heimasíðuna www.faroeiceland.ca

*Vegna fyrireikararnar*
*Marjun í Gong*

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.



# Hús í Klaksvík

Sethúsaognin matr. nr. 55 og 56, Klaksvík, Stoksoyrarvegur 65, verður seld, um hóskandi boð fæst.

Grundøkini eru til støddar 251 m2 tilsamans. Eldri parturin av húsunum er bygdur uml. 1940 og nýggjari parturin uml. 1950. Í 1987 vórðu húsini umvæld. Tey vórðu bjálvað, kløðd við timbri, tak og vindeygu skift. Húsini kunnu nýtast sum tvær sjálvstøðugar íbúðir, ella sum ein eind.

Húsini eru innrættað soleiðis:

**Eldri parturin:**
Miðhædd: Gangur, stova og køkur.
Á loftinum: Lítið kamar, størri kamar, kvistur, baðirúm og úti á lofti.

**Nýggjari parturin:**
Miðhædd: Gangur, køkur og stova.
Loft: 3 kømur og baðiverilsi.

Úthús við kjallara og hjalli standa á stykki-num.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til Fríðu Patursson, advokat, telefon 353335 ella t-post frp@jura.fo og skrivaran Maibritt Johannessen t-post maj@jura.fo

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo

# Loppumarknaður

við tombola og kaffiútsølu verður í Støkkhøllini á Glyvrum, leygardagin 31. mai frá kl. 10.00 til kl. 18.00.

Lutir kunnu latast inn í Støkkhøllina, týsdagin 27.05, mikudagin 28.05 og hósdagin 29.05, frá kl. 17.00 til 19.00.

Eisini ber til at gera eina avtalu á tlf. 219214 (Karin) og 226088 (Maria).

**Fornminnisfelagið á Glyvrum**